# Hótti við at stinga liðfelaga

El-Hadji Diouf hevur ofta latið sín óhepna atburð skugga yvir fótbóltsevnini, og tað hevur aftur gjørt nú. The Sun skrivar, at Diouf skal hava hótt liðfelagan í Sunderland, Anton Ferdinand, við at stinga hann við knívi, eftir at teir høvdu skeldast eftir eina venjing. Kanska var tað orsøkin til, at Diouf um vikuskiftið hevur skift til Blackburn at spæla.




# Raúl tekur málmet

Álopsspælarin Raúl skoraði um vikuskiftið mál nummar 307 fyri Real Madrid, og harvið tók hann seg upp undir liðina á Alfredo Di Stéfano sum toppskjútti í spanska kongafelagnum. Raúl er liðformaður í Real Madrid, og hóast hann stundum hevur verið fyri atfinningum fyri síni avrik, hevur hann støðugt gjørt mál fyri Real Madrid, og í løtuni eru avrikini heilt góð.

# Estiskur professari hjálpir føroyskum svimjarum

**Rein Haljand, sum er professari í rørslum, hjálpir nú Pál Joensen í streman hansara eftir at røkka upp á hægstu tindar**

SVIMJING
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*




*Pál Joensen varð um vikuskiftið testaður av Rein Haljand, sum nú gevur føroyska gullfiskinum góð ráð um, hvussu tíðirnar kunnu gerast enn betri*
*Mynd: Rókur í Jákupsstovu*

Svimjisamband Føroya er byrjað eitt samstarv við estiska professarin, Rein Haljand. Rein er professari í menniskjaligum kinetikki, t.e. rørsla. Í nógv ár hevur Rein Haljand kanna og rætta svimjirørslur hjá nógvum heimsstjørnum innan svimjing.

Svimjisambandið hevur sent Pál Joensen til Estland, har hann verður testaður av Rein Haljand leygardagin 31. januar. Hetta er fyrsta stig í eini samstarvsavtalu við heimskenda Rein Haljand. Ætlanin er at Reijn kemur til Føroyar í vár at kanna bestu føroysku svimjararnir.

Mannagongdin er tann at svimjarin verður filmaður í hylinum, og verða rørslurnar síðani kannaðar og svimjarin fær so ráð um, hvussu betrast kann um teknikkin. Rein hevur gjørt hesar kanningar í nógv ár, og listin við heimsstjørnum er langur, t.d.: Salnikov, Popov, Thorpe, Sievenen, Fröländer, Kammerling og Nordenstam. Til olympiski leikirnir í Athen í 2004 hevði Rein kannað 400 av teimum 800 svimjarunum, ið luttóku.

Svimjisamband Føroya vónar við hesum tiltakið, at vit fáa betra um støðuna hjá okkara svimjarum.

# Odmar helst til Brøndby

**Tað er sannlíkt, at ungi B36'arin í dag skrivar undir sáttmála við danska Brøndby**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Nógv bendir á, at Odmar Færø nú skal royna seg hjá danska stórfelagnum, Brøndby*

Danska transfer-vindeygað letur aftur í dag, og lítil ivi er um, at fleiri spælarahandlar verða at síggja, so hvørt sum klokkan nærkast midnátt.

Ein av handlunum, sum helst er í væntu, hevur føroyska undirskrift. Odmar Færø, sum fyri tað mesta er uppvaksin í Skotlandi, men sum í fyrraárið og í fjør hevur gjørt um seg á besta liðnum hjá B36, er nevnliga heilt nær einum sáttmála við danska stórfelagið Brøndby.

Tað hevur ikki borið okkum til at fáa tíðindini váttað. Jákup í Stórustovu, spælaraumboðsmaður, sigur seg ongar viðmerkingar hava til fótbóltsframtíðina hjá spælaranum, og í Brøndby bar okkum ikki til at fáa fatur á Kim Vilfort, talentstjóra.

Skiftið tykist tó rættiliga sannlíkt, og verður hetta veruleiki, skal B36 kanska standa seg við eini spildurnýggjari verju, tá teir fara undir nýggja kappingarárið.

Í mun til liðið, sum í fjør hevði eina tí sterkastu verjuna í landinum, er Meinhardt Joenen farin úr málinum. Eitt pláss, har B36 tó enn er væl fyri, nú Tróndur Vatnhamar hevur skrivað undir sáttmála við felagið.

Alex José dos Santos hevur í fleiri ár røkt bakkplássið í vinstru, men hann skal eftir øllum at døma spæla við EB/Streymi, har tað sigst, at tey nú bert bíða eftir arbeiðs- og uppihaldsloyvinum, áðrenn sáttmáli verður skrivaður. Í miðverjuni var Dmitrij Jankovic í fjør ein sannur brandur, men hann roynir seg nú í ungverskum fótbólti, og enn er Herbert í Lon Jacobsen ikki farin undir venjingarnar, skilst.

Útskiftingin var eisini sjónlig, tá B36 um vikuskiftið spældi venjingardyst móti Víkingi. Tí her spældi liðið við mest sum púrasta nýggjari verju, har ungir mans av álvara skuldu royna seg.

Víkingur vann venjingardystin 2-1.

